## Egholm er aftur formaður

Felagið 12. maður, sum er áskoðarafelagið hjá føroyska fótbóltslandsliðnum, hevði í farnu aðalfund.

Verandi formaðurin, Regin Bláhamar, boðaði her frá, at hann í løtuni ikki hevur stundir at røkja formanssessin, og tí varð neyðugt við nýggjum formansvalið.

Nýggi formaðurin er tó ikki heilt so nýggjur kortini. Regin Egholm var frá byrjan formaður í 12. manni, og tann sessin røkti hann fram til í fjør, tá Regin Bláhamar tók við. Nú hevur Egholm so aftur tikið við formanssessinum, so nakrar kollveltandi broytingar verður talan neyvan um hjá 12. manninum.

Í nevndini í felagnum eru nú Regin Egholm, Tommy Falkenberg, Janus Rein og Jónleif Frederiksen.

**-jm**

## Svimjingin byrjar aftur

Komandi vikuskiftið verður fyrsta kappingin í nýggja svimjiárinum, tá sonevnd metkapping er í Klaksvík.

At talan er um metkapping merkir, at bólkingin av svimjarunum hesa einu ferðina verður tann sama, sum hon var seinasta kappingarár, og tí hava svimjararnir her ein seinasta møguleika at seta bólkamet, áðrenn tey verða flutt upp. Tí kann kanska roknast við, at fleiri nýggj met verða sett. Ikki minst nú oyggjaleikir hava verið í ár, og at tað tí kann roknast við, at fleiri av svimjarunum eru heilt væl fyri.

**-jm**

# Bjørk gjørdi mest um seg

**FM-kappingin í frælsum ítrótti varð hildin á Svangaskarði um vikuskiftið, og serliga var tað Bjørk Herup Olsen, sum gjørdi um seg**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR

*Jákup Mørk*



*Randi kundi sunnudagin leggja føroyska metið á trístøkk afturrat sínum metlista. Hesin telir umframt lopið eisini føroyska metið í kúluvarpi*

Sunnudagin varð FM í Frælsum ítrótti hildin á Svangaskarði. Hetta er ein ítrótt, sum seinnu árini hevur havt tað rættiliga trupult, og luttakaratalið á Svangaskarði bar sum so heldur ikki boð um, at talan er um tí stóru framgongdina.

### Tey ungu eru ávegis

Glottar vóru tó at hóma, tí í nøkrum kappingum vóru íðkarar í yngra endanum, sum veruliga gjørdu um seg. Tað er tó framvegis eingin loyna, at skal frælsa ítróttinum vera lív lagað, so er fyrst og fremst neyðugt, at rekrutteringin verður økt. Og sum tað so ofta hevur verið sagt - og tað varð endurtikið á Svangaskarði - so gerst hetta best, um ein rennibreyt eisini kemur í Havn.

Skal tosast um met, so var tað Bjørk Herup Olsen, sum gjørdi so nógv mest um seg á Svangaskarði. Hon setti føroyskt met á 400 metra teininum, og hartil setti hon bólkamet á 100 metrum og á 800 metrum. Eitt bólkamet, sum er fyri gentur 14 ár.

Eisini Jóan Karl Joensen setti bólkamet - hetta ídreingir 18 - á 400 metra teininum, sum hann rann í 56,3 sekundum, og Jan Elmar Sørensen og Rannvá Djurholm settu eisini bólkamet á 5.000 metrum hjá monnum og kvinnum.

Og at enda kann eisini staðfestast, at Randi Kúrberg setti nýtt met í trístøkk fyri kvinnur. Her hevði hon eina roynd, sum var 8,44 metrar, men ta ferðina var vindurin ov nógvur. Ein onnur roynd var 8,35, og tað er so fyrsta føroyska metið, sum verður skrásett í hesi kappingargreinini.

**Úrslitini í kappingini vóru hesi:**

**100 m Menn** — **Vindur: +2,6**

| Nr. | Úrslit | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 11,6 | Rógvi Højgaard | 1983 | Bragdið |
| 2 | 12,4 | Finn Hansen | 1968 | Frælsi |
| 3 | 12,6 | Evald við Garð | 1972 | Bragdið |

**100 m Kvinnur** — **Vindur: +2,6**

| Nr. | Úrslit | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag |
|---|---|---|---|---|
| - | 14,4 | Bjørk Herup Olsen | 1991 | Bragdið |
| | * | Blandað kapping! | | |

**400 m Menn**

| Nr. | Úrslit | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 56,3 | Jóan Karl Joensen | 1987 | Bragdið |
| 2 | 60,0 | Evald við Garð | 1972 | Bragdið |
| 3 | 63,0 | Finn Hansen | 1968 | Frælsi |

**400 m Kvinnur**

| Nr. | Úrslit | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag |
|---|---|---|---|---|
| - | 67,1 | Bjørk Herup Olsen | 1991 | Bragdið |
| | * | Blandað Kapping | | |

**800 m Menn**

| Nr. | Úrslit | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 2.07,0 | Jóan Karl Joensen | 1987 | Bragdið |
| 2 | 2.21,1 | Evald við Garð | 1972 | Bragdið |
| 3 | 2.30,2 | Sølvi Reinert Hansen | 1970 | Roysnið |

**800 m Kvinnur**

| Nr. | Úrslit | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag |
|---|---|---|---|---|
| - | 2.33,1 | Bjørk Herup Olsen | 1991 | Bragdið |
| | * | Blandað Kapping | | |

**5000 m Menn**

| Nr. | Úrslit | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 17.07,8 | Guttorm Sørensen | 1968 | Treysti |
| 2 | 17.21,5 | Cecil Weihe | 1965 | Bragdið |
| - | 17.55,3 | Jan Elmar Sørensen | 1991 | Treysti |

**5000 m Kvinnur**

| Nr. | Úrslit | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag |
|---|---|---|---|---|
| - | 21.46,7 | Rannvá Djurholm | 1992 | Bragdið |

**Longdarlop Menn**

| Nr. | Úrslit | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 5,62 | Rógvi Højgaard | 1983 | Bragdið |
| 2 | 5,05 | Finn Hansen | 1968 | Frælsi |
| 3 | 4,93 | Evald við Garð | 1972 | Bragdið |

**Trýstøkk Menn**

| Nr. | Úrslit | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 10,57 | Evald við Garð | 1972 | Bragdið |
| 2 | 10,27 | Heri Ziska | 1967 | Bragdið |
| 3 | 9,56 | Finn Hansen | 1968 | Frælsi |

**Trýstøkk Kvinnur**

| Nr. | Úrslit | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 8,44 | Randi Kúrberg | 1972 | Bragdið |
| | 8,35 | Randi Kúrberg | 1972 | Bragdið |

**Kúluvarp Menn**

| Nr. | Úrslit | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 11,58 | Heri Ziska | 1967 | Bragdið |
| 2 | 10,36 | Jan Zachariasen | 1977 | Bragdið |
| 3 | 9,35 | Poul Anker Zachariasen | 1979 | Bragdið |

**Kúluvarp Kvinnur**

| Nr. | Úrslit | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 8,23 | Randi Kúrberg | 1972 | Bragdið |
| 2 | 7,70 | Meifríð W. Hansen | 1978 | Bragdið |
| 3 | 6,87 | Silvia Lauritsen | 1978 | Bragdið |